Almanna- og heilsumálaráðið

Dagfesting:	12.01.2026
Mál nr.:	25/23432
Málsviðgjørt:	
Ummælistíð:	07.11.2025 – 26.11.2025
Eftirkannað:	27.11.2025

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heilivág
(Nágreina at ferðandi kunnu hava við sær heilivág til egna nýtslu til landið)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 67 frá 28. apríl 2025 um heilivág, verður § 5, stk. 2, nr. 1 orðað soleiðis:

"1) Ferðandi kunnu hava heilivág til egna nýtslu við sær til landið."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Við uppskotinum verður ein tøknilig broyting gjørd, sum nágreinar, at ferðandi kunnu hava heilivág til egna nýtslu við sær til landið.

Endamálið við uppskotinum er at nágreina ásetingina, soleiðis at hon meira greitt endurspeglar verandi siðvenju á økinum. Sambært verandi siðvenju kunnu ferðandi, sum ferðast til Føroya, hava heilivág til egna nýtslu við sær til landið.

1.2. Galdandi lóggáva
Í grein 5, stk. 2, nr. 1 í lóg um heilivág er ásett, at "persónar kunnu flyta inn heilivág til egna nýtslu".

Í viðmerkingunum til ásetingina stendur, at persónar verða at skilja sum einstaklingar við ella uttan bústaði her á landi, sum hava neyðugan heilivág til egna nýtslu við sær. Harafturat stendur, at endamálið við ásetingini er at áseta reglur fyri, hvussu einstaklingar kunnu ferðast landa millum við heilivági uppi á sær.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at nágreina ásetingina, soleiðis at hon meira greitt endurspeglar verandi siðvenju á økinum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at nágreina ásetingina, soleiðis at hon meira greitt endurspeglar verandi siðvenju á økinum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Lógaruppskotið hevur verið sent til ummælis til:

Landsapotekaran
TAKS

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur við sær fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur við sær avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur við sær avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Millumtjóðasáttmálar, sum Føroyar hava skyldu at fylgja, eru ikki á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið ger seg ikki inn á Hoyvíkssáttmálan og Evropeiska Mannarættindasáttmálan, EMRS.

2.9. Markaforðingar
Kendar markaforðingar eru ikki á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing o.a.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógauppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógauppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar við sær.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Broytingin fevnir um, at orðið "persónar" verður skift út við orðið "ferðandi", og at orðingin verður broytt til: "Ferðandi kunnu hava heilivág til egna nýtslu við sær til landið."

Við hesum verður orðaljóðið í ásetingini gjørt meira nágreiniligt og samsvarandi galdandi siðvenju og viðmerkingum til lógina. Í verandi lógarviðmerkingum stendur, at endamálið við ásetingini er at áseta reglur fyri, hvussu einstaklingar kunnu hava við sær heilivág, tá tey ferðast millum lond. Nýggja orðingin ger hetta greitt, men broytir ikki sjálva rættarstøðuna.

Tað verður framvegis ein treyt, at tann heilivágur, sum ferðandi hava við sær, er ætlaður til teirra egnu nýtslu, og at talið ella mongdin av heilivági er hóskandi til eina vanliga persónliga nýtslu. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um, hvussu stórar mongdir av heilivági ferðandi kunnu hava við sær til egna nýtslu til Føroya, samsvarandi § 5, stk. 3 í heilivágslógini.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Almanna- og heilsumálaráðið, 12. januar 2026

Margit Stórá
landsstýriskvinna

/ Bjørgfríð Ludvig

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá TAKS